Fróðskaparsetur Føroya

3. februar 2010

# Fundarfrágreiðing til fund í bygnaðarbólkinum 3/2010

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Onsdagur 3. februar 2010 kl. 13.00 – 14.30 |
| Fundarstað: | Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya |
| Til staðar: | Súsanna Mortensen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Rúna Hjelm, Randi Durhuus, Kári á Rógvi og Birgit Fredriksberg.<br>Ikki til staðar: Jóannes Hansen, Hanna Horn og Anni Djurhuus. |

Á skránni vóru hesi mál:

| | |
|---|---|
| kl. 13.00 | Súsanna og Jóannes greiða frá starvsinnihaldi hjá útbúgvingarleiðarunum og toymislærarum |
| kl. 13.30 | Hans Pauli greiðir frá starvsinnihaldi hjá ábyrgdarlærarum |
| kl. 14.00 | Randi og Rúna greiða frá uppskoti til skipan av lestrarráðum og akademiskum ráð á Setrinum |

Til fundin høvdu Súsanna Mortensen og Jóannes Hansen fyrireikað eina skrivliga lýsing av starvsinnihaldinum hjá útbúgvingarleiðarunum á Fróðskaparsetrinum. Súsanna byrjaði fundin við at greiða frá lýsingini av starvsinnihaldinum. Fundarluttakararnir høvdu ymiskar viðmerkingar til lýsingina, millum annað um tað skal verða eitt krav, at útbúgvingarleiðarar skulu hava universitetspedagogikk ella annað prógv fyri pedagogiskan førleika. Niðurstøðan varð, at útbúgvingarleiðarar skulu í minsta lagi hava pedagogiskar royndir. Semja varð eisini um, at framyvir skal lektaraførleiki verða eitt krav til útbúgvingarleiðarar og at varadekanur skal finnast millum útbúgvingarleiðararnar á deildini. Súsanna helt áfram við at greiða frá starvsinnihaldinum hjá toymislærarum á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Hon hevði skrivað eitt yvirlit yvir uppgávurnar og skipanina av toymislærarunum. Á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum eru í løtuni 8 lærarar. Undirvísingin er skipað soleiðis, at 2 lærarar hava ábyrgdina av undirvísingini fyri hvørja hálvu og hvønn árgang av lesandi. Annar av hesum lærarunum er toymisleiðari. Undirvísingarleiðarin vísir til dekanin og toymisleiðarin vísir til undirvísingarleiðaran.

Hans Pauli Joensen greiddi síðani frá um skipanina av undirvísingini á Náttúruvísindadeildini. Hann brúkti lívfrøðiútbúgvingina sum dømi, av tí at henda útbúgvingin er best skipað á deildini. Í lívfrøðiútbúgvingini er Eyðfinn Magnussen fakligur samskipari. Afturat honum er ein fakbólkur og undir honum eru ábyrgdarlærarar. Fakligur samskipari kann metast at vera útbúgvingarleiðari, um vit sammeta við skipanina við útbúgvingarleiðarum, og ábyrgdarlærarar eru at meta á sama støði sum toymislærararnir á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Ábyrgdin hjá ábyrgdarlærarunum á NVD er millum annað at hava fakliga ábyrgd og tilrættaleggingarábyrgd av skeiðum, herí m.a.

- planleggja og dagføra skeiðini (gera skeiðslýsingar og undirvísingarætlanir)
- undirvísa og finna møguliga leysalærarahjálp
- fyriskipa próvtøkur

Seinasta punkt á skránni varð flutt til komandi fund, av tí at onkur skuldi á annan fund kl 15.

Skrá fyri komandi bygnaðarfund:

1. Rúna og Randi leggja fram uppskot um skipan av lestrarráðum og akademiskum ráð á Setrinum.
2. Zakaris greiðir frá granskingarhjálparunum á Føroyamálsdeilini og Hans Pauli um laborantstarvið á Náttúruvísindadeildini.
3. Súsanna greiðir frá arbeiðinum við at gera ein KT-politikk á SRFS.
4. Vit leggja eina ætlan fyri víðari arbeiðið í bygnaðarbólkinum. Neyðugt verður helst, at vit hvør fyri seg skriva uppskot til niðurstøður, sum vit taka upp til viðgerðar á fundunum 16.-18. februar.

Komandi fundur í bygnaðarbólkinum verður týsdagin 9. februar kl. 10.00-12.00 á Setursskrivstovuni.